## Tjóðveldi klárt í Eysturoy

Í gjárkvøldið hevði Eysturoyar Tjóðveldisfelag 2. og 3. uppstillingarfund til komandi løgtingsval, sum varð hildin í Eiðis Skúla. Væl av fólki var møtt til fundar úr allari oynni, skrivar felagið í tíðindaskrivi. Nevndin boðaði frá, at tey fimm valevnini, sum høvdu játtað at verða uppstillað á fyrsta uppstillingarfundi, sum varð hildin í Fuglafirði í juni mánaði, framvegis stóðu á listanum. Á fundinum í gjárkvøldið vóru trý onnur valevni skotin upp, og tey játtaðu øll at stilla upp. Endaliga uppstillingin sær soleiðis út: Kristina Berg, studentaskúlalærari, Fuglafjørður, Olga Biskopstø, cand comm., Syðrugøta, Tórbjørn Jacobsen, skipari, Glyvrar, Olaf í Garði Joensen, maskinmeistari, Eiði, Sonni Johansen, stjóri, Strendur, Fríðfinnur Johnsson, skúlastjóri, Leirvík, Kristbjørg Toftegaard, røktarleiðari, Skála, Petur í Túni, skipari, Toftir.



## Útisetar atkvøða til løgtingsval

Sjálvt um Fólkatingsvalið stendur fyrst fyri durum, so er Altjóða Skrivstovan, ASK, farin í gongd við at fyrireika løgtingsvalið fyri útisetar, sum eins og tær seinastu ferðirnar hava kunnað atkvøtt til løgtingsvalið. ASK heitir á øll lesandi um at skráseta seg og greiða atkvøðu. Seinasta freist at skráseta seg, er tríggjar vikur áðrenn valið. Hetta skal gerast hjá tí heimkommununi, ella haðani útisetin flutti frá úr Føroyum. Um ikki nýval kemur áðrenn, er freistin at koma upp á listan 30. desember.

# Næmingar í starvsvenjing

**Í hesum døgum er 10. flokkur í Fuglafjarðar skúla í starvsvenjing. Ein teirra, Bjørg Jarnskor er á Sosialinum og hevur hon hitt nakrar av floksfelagum sínum, sum starvast ymsastaðni í Havn**



**Lena Bærentsen er í Gelluni**

## Ikki so nógv at gera

*Hví valdi tú hetta arbeiðsplássið?*
Tí eg vildi vera onkustaðni har nógv fólk eru. So tonkti eg uppá SMS og eg helt at tað ljóðaði spennandi at roynandi Gelluna.
*Hvat hevur tú gjørt í dag?*
Eg havi lagt klæðir uppá pláss, staðið við kassan og hjálpt kundum. Annars hendir ikki so mangt her.
*Kundi tú hugsað tær at gjørt hetta arbeiði í framtíðini?*
Nei, tí at mær dámar væl at vera í gongd allatíðina, men her er ov lítið at gera.
*Er tað stuttligt at vera í Gelluni?*
Ja, tað er fínasta slag, men tað hendir ikki so nógv.

## Áhugavert at arbeiða við leiri

**Marita á Lakjuni og Helena Midjord eru á Leirlist**



*Hví valdu tit hetta arbeiðsplássið?*
Tað ljóðaði áhugavert, og vit tíma væl at fáast við sovorðið, leir og annað. Og vit vistu at vit ikki fóru at keða okkum.
*Hvat gera tit til dagligt á arbeiðsplássinum?*
Vit hava verið nógv á háskúlanum og arbeitt við glas, gjørt smúkkur og annað tílíkt. Hetta er sera spennandi at arbeiða við.
*Kundu tit hugsað tykkum at arbeitt við hesum í framtíðini?*
Nei, vit halda at hetta er meira eitt frítíðarítriv, men tað er ógvuliga spennandi og avslappandi.
*Halda tit at tað er stuttligt?*
Ja, ógvuliga stuttligt og áhugavert.

**VENJING**
*Bjørg Jarnskor*
*starvspraktikantur*

## Seymi fyri tað mesta

**Helena Kannuberg er hjá Sonju Design**



*Hví hevur tú valt hetta arbeiðsplássið?*
Tí at mær dámar væl at seyma og eg vildi vita hvussu eitt sovorðið arbeiði gekk fyri seg. Mær dámar eisini væl at vera kreativ.
*Hvat gert tú til dagligt á arbeiðsplássinum?*
Vit seyma fyri tað mesta, og selja tað í handlinum. Eg havi seymað blusur meðan eg havi verið her. Eisini kann man nýta tíðina til at seyma sær sjálvum okkurt lekkurt.
*Kundi tú hugsað tær at gjørt hetta arbeiði í framtíðini?*
Ja, møguliga. Tí í dag eru tað so nógvar møguleikar at fara til, men hetta er ein góður møguleiki. Tað er sera áhugavert at arbeiða við hesum.

## Dámar væl at vera kreativ

**Jóngerð Skoradal er á Akkuleya**



*Hví valdi tú hetta arbeiðsplássið?*
Mær dámar væl at arbeiða við blómum. Tað er sera áhugavert og mær dámar eisini væl at vera kreativ.
*Hvat hevur tú gjørt í dag?*
Í dag eri eg akkurát møtt, so tað er ikki hent so nógv.
**Hvat gert tú til dagligt á arbeiðsplássinum?**
Vit gera blómutyssi, og vit koyra tær til dømis til jarðarferðir, brúdleyp og annað. Vit fáa nógv sløg av blómum sum eru sera spennandi.
**Kundi tú hugsað tær at gjørt hetta arbeiði í framtíðini?**
Ja, møguliga. Tí tað er stuttligt at vera her, og at fáast við blómur. Fólkini eru sera fitt at arbeiða saman við.